**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Merking av toski, havtasku og smákalva á landgrunninum.**
**Túrur nr. 0984**
**Tíðarskeið 23/9-30/9-2009**

---

**Fólk frá HS:** Rógvi Mouritsen, Jens Arni Thomassen, Lise Ofstad og Mourits M. Joensen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, kanningarleiðari.

**Endamál:** Endmálið er við merking, at kanna ferðingarmynstrið hjá toski, havtasku og kalva á føroyska landgrunninum. At sleppa 201 alikalvum út á landgrunnin á trimum ymsum støðum. At taka 25 smáfiskar av Mýlingsgrunninum til Mariu Dam.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol 470 við 100 mm meskum í brókaposanum. Steinhamns-lemmar. Breitlalongdin er 60 m. Rockhopper-grunnur. Til merkingina: merkipistól og merkir, mátibretti, vekt, kassar og slangur, skrivigreiðir og teldur.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hósdagin 24. sept. 2009 kl 1900. Til hendan túrin hoyrir eisini, at 60 alikalvar blivu sleptir, frá tangabili, út av Toftakaj kl 2000 hetta kvøldið (av ískajini innanfyri gl. ferguleguna). Dagin eftir blivu 71 alikalvar sleptir á Mykinesgrunninum kl 0400 og 70 á Mýlingsgrunninum kl 1000. Kalvarnir vóru í støddini frá 48 til 75 cm.
Veðrið var vánaligt men siglingin var lagalig og kalvarnir høvdu tað gott tá teir blivu útsettir. Ongan av hesum sleptu kalvunum fingu vit í trolið tá vit fáar dagar seinni høvdu 16 tóv á somu støðum og nærhendis. Veðrið annars til merkingina var vánaligt, lógu bakk í eitt samdøgur, men tveir teir seinastu dagarnar var veðrið gott.
Alt umborð virkaði væl, bæði við skipi og merking.

**Fyribilsúrslit:** Smáligur fiskiskapur, lítið av toski. Besta merkihálið var 56 og lakasta 3 merktir toskar. Í meðal 17 merktar toskar pr. tóv.
Av høvuðsøkjunum fingu vit hesi: E/Svínoy, Mýlingsgrunnin, Mykinesgrunnin, V/Suðuroy. Harumframt 2 tóv á Norðhavinum og 1 við Nípubakkan.
Vágahavið og Munkagrunnur komu ikki við hesaferð.

Tal av tóvum, tal av merktum toski, havtasku og kalva: *Úrslit 2007*

| Stað: | tóv | toskur | Havt. | Kalvi | *Toskur 2007* |
|---|---|---|---|---|---|
| Svínoyarhavið | 13 | 183 | 25 | | *7 / 158* |
| Norðhavið | 2 | 61 | 1 | 1 | *2 / 35* |
| Mýlingsgrunnur | 6 | 200 | 2 | | *5 / 172* |
| Mykinesgrunnur | 10 | 143 | 3 | 1 | *7 / 158* |
| V/Suðuroy | 9 | 106 | 3 | | *14 / 201* |
| ÚT/Nípubakkin | 1 | 56 | | | |
| Tilsaman | 41 | 749 | 34 | 2 | *36 / 724* |

25 toskar umleið 50 til 55 cm, blivu tiknir til Mariu Dam, Umhvørvisstovan.

**Nær eru merkilistarnir lisnir inn á teldu:**
Sum skjótast og í seinasta lagi 1 mánaða eftir at túrurin endaði.

## Viðmerkingar:

30-09-2009________________________

Rógvi Mouritsen